Fylgiskjal 4

## Nella Festirstein

**Fra:** Halla Djurhuus
**Sendt:** 24. maj 2019 11:48
**Til:** Nella Festirstein
**Emne:** SV: TIL UMMÆLIS: Ríkislógarmæli um at seta Politilógina í gildi fyri Føroyar. Freist 27. mai.

Fiskimálaráðið hevur ikki viðmerkingar til uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om politiets virksomhed.

Vinarliga / Kind regards


Halla Djurhuus
Løgfrøðingur

Fiskimálaráðið / Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 55 32 61 • Fax (+298) 35 30 35 • Halla.Djurhuus@fisk.fo • www.fisk.fo


**Fra:** Nella Festirstein
**Sendt:** 12. april 2019 16:33
**Til:** hem@sorinskrivarin.fo; JKO017@politi.dk; Elkin.Klettheyggj@kriminalforsorgen.dk; Mentamálaráðið ; Almannamálaráðið ; Heilsu- og innlendismálaráðið ; kf@kf.fo; petersen@adv.fo; aaa001@politi.dk; megd@megd.fo; amnesty@amnesty.fo; Fíggjarmálaráðið ; VMR-Journal ; Fiskimálaráðið Journal ; Samferðslumálaráðið ; 'dat@dat.fo' ; 'industry@industry.fo' ; Kundatænastan á TAKS
**Emne:** TIL UMMÆLIS: Ríkislógarmæli um at seta Politilógina í gildi fyri Føroyar. Freist 27. mai.

Hjáheft verður sent tykkum til ummælis uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar *Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om politiets virksomhed.*

**Freistin at senda ummæli er mánadagin 27. mai.**

Ummæli skal sendast til nellaf@tinganes.fo

Við hesum lógaruppskotinum verður sett í verk ein grundleggjandi og samla lóggáva fyri vanliga virksemið hjá politinum. Lógin ásetir eisini tær grundleggjandi meginreglurnar fyri valdsnýtsluni hjá politinum sum liður í vanligum skilhaldi. Við Politilógini verða greiða reglur á hesum øki. Hetta styrkir um rættartrygdina hjá borgarunum, samstundis sum at politiið fær eitt greitt grundarlag at arbeiða út frá í støðum, har politið fyri at kunna røkja sínar uppgávur, má fremja inntriv mótvegis borgarum, møguliga við at brúka tvingsil.

Endamálið við lógaruppskotinum er í høvuðsheitum at føra víðari og nágreina galdandi rætt á teimum økjum, sum § 108 í rættargangslógini í dag verður brúkt sum heimild at gera inntriv mótvegis borgarum. Tað er hvørki ætlanin at avmarka ella víðka verandi inntrivsmøguleikar. Lógin er tillagað føroysk viðurskifti við nøkrum smærri broytingum, sum kunnu síggjast undir serligu viðmerkingunum og í fylgiskjali 1.

Uppskotið til Politilógina hevur 8 kapittlar.

*Kapittul 1 (§ 1)* ásetir endamál og virksemi hjá politinum, sum er at virka fyri tryggleika, friði og skilhaldi í samfelagnum. Politiið skal fremja hetta endamál gjøgnum fyribyrgjandi, hjálpandi og handhevjandi virksemi.

*Kapittul 2 (§§ 2 og 2 a)* lýsir uppgávurnar hjá politinum. Eisini er heimild til politiið at brúka dátagrundaði greiningartól í sínum virksemi yvirhøvur. Ásett er at politið kann savna og viðgera almennar upplýsingar til brúk í sínum arbeiði. Løgmálaráðharrin kann áseta nærri reglur um viðgerð hjá politinum av upplýsingunum og striking av upplýsingum.